# Zyxel WX3401 Vegleiðing

Soleiðis setur tú tráðleysu MESH-loysnina frá Zyxel upp.



## Tak MPro Mesh-appina niður

Appin kann heintast her:

**App Store**

**Google Play**

GG: *Vit skulu gera vart við, at Føroya Tele hevur sjálvvirkandi rættindi at umsita hesa eindina. Hetta merkir, at vit kunnu tillaga eindina til tørvin hjá einstaka kundanum, uppstiga og rætta møguligar feilir á eindini v.m.*

*Víst verður annars til viðskiftatreytirnar fyri breiðband hjá Føroya Tele.*

## Uppseting av einum ella fleiri Zyxel WX3401.

Mælt verður til at sløkkja WIFI á beinaranum, so hann ikki órógvar WIFI á Zyxel WX3401.




1. Set netkaðal millum beinaran og Zyxel WX3401. Tann fyrsta WX3401-eindin verður stýriseind og skal altíð verða knýtt at beinaranum við netkaðali.
2. Set streym til Zyxel WX3401 og bíða, til øll ljós lýsa grønt.
3. Set kaðal millum WX3401-stýriseindina og ta næstu WX3401-eindina. Bíða til øll ljós lýsa grønt.




4. Nú kanst nú taka netkaðalin millum báðar WX3401-eindirnar frá og seta eind 2, har tú vilt hava betri dekning. Minst til, at eindin skal hava gott samband við stýriseindina. Reytt ljós merkir, at útgerðin ikki hevur gott samband, har hon stendur.
5. Hevur tú fleiri WX3401-eindir, skalt tú endurtaka stig 3 og 4.
6. Brúka MPro Mesh-appina til at broyta tráðleysa navnið og loyniorðið.
   GG! Vit viðmæla, at man sjálvur velur eitt tráðleyst navn og loyniorð, heldur enn at brúka tað, sum stendur á lepanum á útgerðini.
   Eitt gott og trygt loyniorð inniheldur minst 12 tekn, smáar og stórar bókstavir, tøl og sertekn.
   Fleiri góð ráð til loyniorð eru at síggja á [https://www.kt-trygd.fo/god-rad/god-loyniord/](https://www.kt-trygd.fo/god-rad/god-loyniord/)

## MPro Mesh-appin – Broyt loyniorð




Trýst á **WiFi** fyri at broyta tráðleyst navn og loyniorð.



## Staðseting av útgerð

Best er at staðseta MESH-eindirnar, so tær mynda ein tríkant.

- Set eindina, so hon sæst.
- Eindin skal standa ovarlaga.
- Eindin skal ikki fjalast t.d. í skápi ella aftan fyri sjónvarp
- Set ikki eindina tætt við tráðleys tól, t.d. mikroovnar og barnaalarmar.



